

## Móðir og dóttir á sama liði

37 ára gamla Bára S. Klakstein og 15 ára gamla dóttir hennara, Eyðvør Klakstein, vóru báðar á liðnum hjá KÍ, sum vann 2-0 á Skála um vikuskiftið. Tað er sjáldsamt, at fótbólturin sær móðir og dóttir á sama liði, men tað varð veruleikið á Skála. Eyðvør Klakstein fylti 15 ár sama dag og hevði tí møguleika at spæla við besta liðnum hjá KÍ. Bára Klakstein hevur spælt 196 dystir fyri KÍ og skotið 48 mál seinastu 18 árini. Tað er kvinnufotbolt.com, sum ber tíðindini.

*savnsmynd*

# Tauman undirvísir í døming



*– Vit hava broytt reglurnar eitt sindur, soleiðis, at hondbóltsspælarar skulu verða á vøllinum vikuskifti aftaná vikuskifti, uttan at dragast við skaðar, sigur Johnny Trauman*

**HONDBÓLTUR** Johnny Tauman, altjóða dómaraserfrøðingur, hevur havt dómaraskeið kring landið í vikuni

Uni Holm Johannesen

Tauman hevur verið í Klaksvík, Havn og Vestmanna, og í kvøld fer hann inn á Skála. Hann hevur havt skeið fyri hondbóltsdómarunum.

Orsøkin er, at hondbóltsreglurnar eru munandi greiðari nú enn áður.

– Vit hava broytt reglurnar eitt sindur, soleiðis, at hondbóltsspælarar skulu verða á vøllinum vikuskifti aftaná vikuskifti, uttan at dragast við skaðar. Ymsar hondbóltslógir er nú greiðari, og eingin ivast í, hvat er rætt og skeivt, sigur Johnny Tauman í viðtalu við heimasíðuna hjá Hondbóltssambandinum.

Johnny Tauman er limur í dómaranevndini í DHF, er dómaraeygleiðari á høgum støði, umsetir allar hondbóltslógir úr týskum til danskt og hevur ábyrgdina av, at allar danskar hondbóltslógir eru dagførar.

*uni@sosialurin.fo*



*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Landsliðsleikararnir
# 20 ár seinni

**FÓTBÓLTUR** Tað eru nú 20 ár liðin síðan minniliga sigurin í Landskrona. Á føroyska fótbóltslandsliðnum er Jens Martin Knudsen, sum er málmansvenjari, einasta sambandið til teir 16, sum vóru á vøllinum ella á beinkinum í Landskrona. Jákup Mørk, fyrrverandi ítróttarskrivari á Sosialinum, leitaði fyri tveimum árum síðan landsliðsleikararnar fram aftur. Vit endurgeva greinina, við smáum broytingum, so teksturin er tíðarhóskandi

Jákup Mørk

Hvar fóru teir, og hvat gera teir nú. Og hvør spældi við?

Tað eru spurningar, sum fleiri helst seta sær, tá litið verður aftur á liðið, sum basti Eysturríki í Landskrona á sinni. Tað sama ger seg galdandi í Eysturríki, har teir 16, sum vóru partur av eyðmýkjandi tapinum seint verða gloymdir.

Saman við Bartl Harald frá eysturríska Nachrichten hava vit sett upp niðanfyristandandi yvirlit.

### Føroyska liðið

**Jens Martin Knudsen:** Málverjin við topphúgvuni gjørdist heimskendur eftir síni brøgd í Landskrona. Tá spældi hann við NSÍ, men fótbólturin tók hann síðan til GÍ í Gøtu, íslendska Leiftur – har hann eisini var venjari, skotska Ayr og aftur til barndómsfelagið í Runavík, har hann at enda var partur av fyrsta FM-heitinum hjá felagnum. Var eisini ein merkisverdur ítróttarmaður, sum var føroyameistari í fimleiki og toppskjútti í hondbóltskappingini, har hann eisini var við á U21-landsliðnum. Er í dag málmansvenjari á landsliðnum og framleiðslustjóri á Viking Seafood, umframt at hann arbeiðir fyri samtak, sum hevur til endamáls at byggja fótbóltshøll.

**Tummas Eli Hansen:** Treiski verjuspælarin spældi øll árini við B36, og eftir seinasta dystin í 1997 kundi hann taka móti fyrsta FM-steypinum hjá felagnum í 35 ár. Síðan miðskeiðis í 90'unum hevur hann eisini rikið egið el-innleggjaravirki.

**Jóannes Jakobsen:** Liðskiparin og heilin í verjuspælinum spældi fótbólt nøkur ár afturat. Tað er tó mest sum venjari og viðmerkjari, at hann hevur gjørt vart við seg síðan. Sum venjari hevur hann verið hjá VB, KÍ, HB, B68 og B36, har gullmerkið í HB í 2002 er størsti sigurin. Í borgarliga starvinum er hann lærari, umframt at hann í frítíðini er íðin tónleikari. Hevur eisini egið studio, har hann framleiðir fleiri útgávur fyri onnur. Er í dag hjálparvenjari hjá HB.

**Mikkjal Danielsen:** Maskinmeistarin úr Miðvági tók fullkomiliga pippið frá Tony Polster, sum var størsta eysturríska stjørnan um hetta mundið. Mikkjal spældi ikki so nógvar dystir afturat á landsliðnum, tá hann taldist millum teir eldru á liðnum, og enn sum áður starvast hann sum maskinmaður í Miðvági.

**Julian Hansen:** Høgri bakkurin spældi bara tann eina landsdystin afturat eftir Landskrona, tí eftir